# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

StÍF-Neistin:

# Neistin skal steðga steypaliðnum

**StÍF og Neistin møtast mikukvøldið í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini hjá monnum, og her er spurningurin, um Neistin klárar at steðga góðu gongdini hjá StÍF í steypakappingini**



*StÍF tekur ímóti Neistanum í fyrra hálvfinaluni teirra millum í annaðkvøld.*

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

StÍF er steypaliðið í føroyskum manshondbólti. Seinastu árini hava teir verið mest sum fastir fúsir á vøllinum, tá steypafinalan er farin av bakkastokki, og í flestu førunum hava teir eisini megnað at vunnið finalurnar.

Mikukvøldið skulu teir leika fyrstu hálvfinaluni í hesum kappingarárinum, tá teir møta Neistanum á heimavølli. Neistin hevur ikki tey heilt góðu úrslitini at vísa á í steypahøpi í manshondbólti síðstu árini, men nú hava teir møguleikan at broyta hesi hagtøl við einum samlaðum sigri á StÍF.

**Liðini hava verið sera jøvn**

Hyggja vit eftir gongdini hjá hesum liðunum í landskappingini, so er alt sum týðir uppá, at hálvfinalurnar millum liðini bæði fara at vera sera tættar og spennandi. Her vísir stigatalvan, at bara eitt stig er á muni millum liðini, sum liggja á ávikavist øðrum og triðja plássi.

StÍF og Neistin hava eisini leikt tvær ferðir ímóti hvørjum øðrum í grundspælinum, og í báðum førunum var talan um sera tættar og spennandi dystir. Í allarfyrsti dysti á árinum møttust liðini á Hálsi, og tá megnaði StÍF at vinna við einum málið eftir ein sera javnan dyst.

Eisini seinni dysturin bleiv sera spennandi. Her fylgdust liðini at kalla allan vegin, og tá Áki Mørk við góðum 10 sekundum eftir á klokkuni javnaði, mundu øll halda, at nú fóru liðini at býta stigini. Men enn einaferð vildi StÍF tað øðrvísi. Í síðsta sekundi fingu teir brotskast, sum teir skoraðu uppá, og sostatt vann Neistin eisini henda dystin við einum málið.

Sjálvtum StÍF hevur vunnið báðar dystirnar í ár, so hava teir tó vera somikið javnir, at áhugaði kunnu vænta sær ein tættan og spennandi dyst mikukvøldið. So er spurningurin, fer Neistin at steðga góðu gongdini hjá StÍF í steypahøpi? Hetta fer bert tíðin at vísa.

---

VÍF-KÍF:

# VÍF er favorittur

**VÍF er greiður favorittur í hálvfinaluni í steypakappingini hjá monnum, tá teir taka ímóti KÍF í fyrsta dystinum. KÍF hevur tó víst gott spæl síðstu dystirnar, og teir ætla sær við vissu at spæla sín kjans ímóti VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

VÍF hevur ikki verið til at steðga síðstu nógvu dystirnar í bæði lands- og steypakapping. Fyrstu dystirnar í landskappingini var gongdin hjá VÍF ikki so góð, men síðani 4. umfar hava teir vunnið allar sínar dystir, og nú eru sigrarnir vorðnir 9 á rað.

Hjá KÍF hevur verið meir upp og niður. Teir hava fingið fleiri góð úrslit ígjøgnum árið, men sum heild hava úrslitini verið heldur óstøðug. Dysturin ímóti Neistanum um vikuskiftið vísti tó, at KÍF kann hamla upp við øll lið, tá spælið koyrir, og so er spurningurin, hvussu tað verður ímóti VÍF.

Eingin ivi er tó um, at VÍF er greiður favorittur undan fyrru hálvfinaluni. KÍF hevur at kalla eingi góð úrslit at vísa á í steypakappingum síðstu árini, meðan VÍF hinvegin hevur fleiri finalupláss at vísa á. Harafturat er VÍF klárt oddaliðið í Atlantic Airways deildini, og tí eru teir stórfavorittur.

KÍF hevur tó fyri fyrstu ferð í á leið 20 ár møguleikan at røkka finaluni í steypakappingini, og teir fara heilt víst at berjast við lív og sál fyri at røkka tí máli, sum leikararnir nú hava sett sær fyri. Trupulleikin hjá teimum er bara, at einasta forðingin á teirra vegi ímóti finaluni er greiða oddaliðið í føroysku kappingini, sum harafturat hevur víst sera gott spæl nógvu teir seinastu dystirnar.

---

Neistin-Stjørnan:

# Oddaliðini bresta aftur saman

**Neistin tekur ímóti Stjørnuni í fyrru hálvfinaluni teirra millum í Coca Cola-kappingini í kvøld**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tey hava mynda oddin í bestu kvinnudeildini í hondbólti seinastu árini, og mest sum hvør innanhýsis dystur hevur verið ótrúliga spennandi. Sunnudagin møttust tey seinast, og tá býttu tey um pláss á stigatalvuni.

Talan er sjálvandi um Neistan og Stjørnuna. Sunnudagin vann Stjørnan toppdystin teirra millum, og tá løgdu tær seg eisini á odda í best kvinnudeildini, har tær bert eru eitt stig frammanfyri Neistan.

Hesi bæði liðini hava eisini drigið hvørt annað í hálvfinalunum í Coca Cola-kappingini, og fyrri dysturin millum liðini verður á skránni í kvøld, týskvøldið, har Neistin tekur ímóti Stjørnuni.

Undanfarnu dystirnir í hesum kappingarárinum hava víst, at munurin á liðunum er ikki serliga stórur. Stjørnan hevur vunnið tvær ferðir, meðan Neistin hevur vunnið eina ferð, og aloftast er tað dagsformurin, sum er avgerandi fyri, hvat av liðunum vinnur dystirnar.

Tað verður helst aftur dagsformurin, sum verður avgerandi, tá liðini møtast í høllini á Hálsi í kvøld, týskvøld.